## TB vinnur silvurstríðið

**ÍF fekk ongan hevnd fyri taptu steypafinaluna. Og hjá monnum roynir Mjølnir enn at hanga í Fleyr**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Enn er Dráttur favorittur at taka meistaraheitið í bestu kvinnudeildini. Men TB gjørdi sunnudagin sítt til, at spenningurin enn ikki er heilt avkláraður.

Fyrst og fremst, so vóru tað tó silvurmerkini, sum stóðu upp á spæl, tá ÍF og TB endurtóku steypafinaluna.

Ta ferðina vann TB 3-1, og úrslitið varð neyvt hitt sama sunnudagin. Dysturin var tó nakað væl harðari hjá TB hesaferð. ÍF tók fyrsta settið, og hóast TB síðani tók rest, so var tað alla tíðina við spenninginum í hæddini. Heilt framat TB slapp ÍF tó ikki, og tí mugu tær ásanna, at talan í mesta lagi verður um bronsu í ár.

Og tað er so heldur ikki víst. SÍ roynir enn at hanga í heiðursmerkjarøðini, og tær vunnu tryggan sigur á Mjølnir sunnudagin. Munurin millum SÍ og ÍF er bara eitt stig, men ÍF hevur tó tann fyrimunin, at tær longu hava spælt móti Drátti tvær ferðir í endaspælinum.

**Mjølnir hongur í**

Hjá monnunum hevur spurningurin fyri tað nógva verið, nær Fleyr fer at tryggja sær meistaraheitið.

Tann spurningurin varð tó í fyrsta lagi avkláraður leygardagin, og nú er tað so bara Mjølnir, sum kann hótta oddaliðið.

Mjølnir vunnu sunnudagin tryggan sigur á SÍ, sum hesa ferð mátti vera nakrar spælarar fyriuttan, og tað var meira, enn tunni hópurin megnaði at bera.

**Meistaradeild kvinnur**

| | |
|---|---|
| SÍ-Mjølnir | 3-0 |
| (25-19, 25-23, 25-18) | |
| ÍF-TB | 1-3 |
| (25-19, 22-25, 24-26, 24-26) | |

**Meistaradeild menn**

| | |
|---|---|
| SÍ-Mjølnir | 1-3 |
| (22-25, 25-23, 22-25, 21-25) | |

KÍF-StÍF 18-23 (6-12):

# StÍF helt stílinum



*Daniel Rápa var fyri fyrstu ferð partur av øðrum liði enn tí hjá VÍF. Og tað man vera lítið at ivast í, at hann er góður styrkur hjá KÍF*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Hesa ferð snávaðu strandingarnir ikki. Við tryggum sigri á KÍF hildu teir tvørtur ímóti fast um plássið frammi í oddinum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

StÍF hevur longu vissað sær heitið sum steypavinnarar, men enn er nógv at spæla fyri. Saman við H71, Kyndli og VÍF eru strandingarnir nevnliga við í stríðnum um tey bæði finaluplássini í manskappingini í hondbólti.

**Snávaðu ikki**

Fram um hini oddaliðini, so hevur StÍF tó ein trupulleika at dragast við. Móti veikaru liðunum hava teir ov ofta lyndi at snáva, og tí mundu áskoðararnir ikki vera heilt álvuligir, hóast KÍF á pappírinum er ein yvirkomuliga uppgáva. Tað mundu somu áskoðarar eisini halda, tá StÍF í endaspælinum hevði heimavøll móti KÍF, sum kortini fór við øllum. Ein støða, sum mundi endurtikið seg, tá Neistin seinni vitjaði á Skála.

Hesa ferð var tó eingin ivi. Fram til hálvanfyrra hálvleik gekk annars javnt á, men tá vertirnir einki mál fingu í eitt korter, sluppu strandingarnir veruliga avstað.

Eftir steðgin tóktist talan ta einu løtuna veruliga at gerast um sorl, men seinasta korterið fekk KÍF kortini pyntað um úrslitið.

**Oddaliðini eftir**

Sum er, so liggja strandingarnir hampuliga væl fyri í royndunum at vinna seg í finaluna. Men treytirnar eru tó greiðar undan seinastu trimum dystunum. Sum minstakrav, so skulu fýra stig spyrjast burtur úr teimum trimum seinastu dystunum, og tað kann verða tungt. H71 á heimavølli og VÍF og Kyndil á útivølli eru í øllum førum uppgávur, sum seta stór krøv.

Hinvegin, so eru stór krøv júst tað, sum strandingunum hóvar best, og tí skulu teir á ongan hátt avskrivast, nú seinastu og avgerandi dystirnir í endaspælinum standa fyri framman.

### FAKTA UM DYSTIN

**KÍF-StÍF 18-23 (6-12)**
**Málskjúttar**
**KÍF:** Gert Hansen 5(1), Sune Davidsen 3, Damir Oros 3, Daniel Rapa 2, Petur Martin Poulsen 2, Rógvi Weihe 1, Karl Johan Djurhuus 1, Arnbjørn Hansen 1
**StÍF:** Artur Johansen 7(2), Leivur Justinussen 5(1), Sveinur Justinussen 5, Mortan Hansen 2, Bárður Danielsen 2, Bent Djurhuus 1, Borgar Danielsen 1
**Brotskøst:** KÍF 2, StÍF 4
**Útvísingar:** KÍF 3, StÍF 1
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen

Neistin-Kyndil 21-32 (8-14):

# Neistin hevði ongan kjans

**Kyndil skúmaði við fullari ferð, tá teir sunnudagin vunnu lættliga á grannunum úr Neistanum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Spenningurin var ikki tann stóri, tá Neistin sunnudagin tók ímóti Kyndli. Á pappírinum skuldi talan verða um avgreiðsluspurning hjá Kyndli, og tann veruleikan staðfestu teir eisini heilt skjótt.

Longu eftir fyrsta korterinum stóð 3-11 á talvuni, og so var ballið líka sum búið hjá Neistanum.

Tað, sum eftir var av dystinum, var tað Kyndil, sum sat við róðursprinnin. Onkra lítla løtu fekk Neistin minkað nakað um munin, og við einum væl leikandi Magnus Matras megnaðu teir eisini at halda muninum nakað niðri. Men nær nøkrum stigi komu teir ongantíð. Til tess var styrkismunurin ov stórur.



*Áki Mørk er nú aftur á liðnum hjá Neistanum, men sunnudagin munaði tað kortini lítið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Neistin hevur annars í onkrum løtum gjørt ein vørr móti ovaru liðunum, og bæði móti VÍF og - serliga - StÍF hava ungu Neista-menninir roynst væl. Men tá talan er um sterkaru liðini, og hesi ikki fella í grøvina, sum tað kann vera, tá lið verða undirmett, so er ikki tað stóra at gera.

Við sigrinum streyk Kyndil fyribils upp á oddasessin. Ein oddasess, sum teir í øllum førum eiga fram til mikudagin. Tá spæla H71 og VÍF sínamillum dystin.

### FAKTA UM DYSTIN

**Neistin-Kyndil 21-32 (8-14)**
**Málskjúttar**
**Neistin:** Blagoje Buha 4(2), Birgir Poulsen 3(1), Áki Mørk 3, Tróndur Kragesteen 3, Jóhan Brekkstein 2, Karl Oddmar Rasmussen 2, Jens Mohr 1, Karl Herup Olsen 1, Rani Slættanes 1, Kári Horn 1
**Kyndil:** Høgni Klein 7(1), Rókur Akralíð 6, Janus Einar Sørensen 6(3), Hjalti M. Jacobsen 4, Hans Áki Dal Christiansen 4, Ragnar Stakkstund 3, Hans Arni Thomsen 1, Poul Rói Mohr 1
**Brotskøst:** Neistin 5, Kyndil 8
**Útvísingar:** Neistin 8, Kyndil 4
**Dómarar:** Dánjal Samuelsen & Heri Petersen.

## Kvinnurnar vandu

Í vikuskiftisblaðnum høvdu vit sum vant nøkur orð um dystirnar, sum skuldu spælast í bestu kvinnukappingini hetta vikuskiftið.

Tað var tó gloppið burtur ímillum hjá okkum, at dystarflytingar hava verið. Kvinnulandsliðið var nevnliga á Eiðið á venjingarlegu um vikuskiftið, og tí vórðu eingir dystir spældir.

Vit biðja lesararnar halda til okkum til góðar.

**-mørk**